GSM:

# Kappingin nærkast

**GSM-kervið hjá Kalli er til reiðar. Í november mánaði verður farið undir at bjóða føroyingum GSM-hald hjá frá Kall, og tað fer at merkja kapping**

GSM
*Heri á Rógvi*




*Mynd: Torben Prior tøkningur hjá Kalli og ein av GSM-støðunum hjá Kalli. Eftir ætlan eru Kall klárir at byrja kappingina á GSM-økinum í næsta mánaði*

*Mynd: Finnur Justinussen*

Í næsta mánaði verður lagt til brots við kappingini á GSM-økinum í Føroyum. Eftir nógv góð og fitandi ár sum einaráðandi á marknaðinum fær Føroya Tele í komandi mánaði kapping frá Kalli.

Tað er nú long tíð liðin síðani, at Kall av fyrstan tíð byrjaði at tosa um at bjóða GSM-tænastur í Føroyum. Bjarni Askham Bjarnason, stjóri fyri Kall, sigur, at teir verða klárir í november, og tá verður farið undir at bjóða GSM-tænastur út til føroyingar.

Kervið í høvuðsstaðnum virkar í løtuni, og fólk hjá Kalli royndarkoyra fyri tíðina skipanina.

Hjalgrím Hentze, tekniskur stjóri hjá Føroya, sigur, at teir í løtuni hava knapt 30.000 GSM-felagar. Tað merkir, at omanfyri 60% av øllum føroyingum eiga og nýta fartelefon.

Í prinsippinum stendur tað øllum kundum hjá Føroya Tele frítt at siga sítt hald upp og stovna eitt nýtt hjá Kalli.

Bjarni Askham Bjarnason vil ikki siga nakað um, hvørji tilboð teir fara at koma við, tá teir koma á marknaðin.

Higartil hevur Føroya Tele svarað aftur við tí tilboðinum, at GSM-felagar kunnu fáa trý nummør bíligari.

**Roaming**

Í fyrstu atløgu verður fer GSM-kervið hjá Kalli »bert« at røkka runt høvuðsstaðin. Ætlanin er so hvørt at útbyggja kervið, soleiðis at tað mesta av Føroyum einaferð verður umfata av kervinum. Føroya Tele hevur longu eitt kervi, sum 99% av landsins íbúgvum kunnu røkka við egnan bústað. Ivasamt er, um hetta netið verður víðkað til at umfata allar Føroyar, tá talan er um kostnaðarmiklar íløgur at seta sokallaðar basustøðir upp.

Kall hevur sjálvan sentralin hjá teimum standandi í gamla Idé Húsinum – í Óðinshædd – sum Postverkið í dag eigur. Har er eisini ein av teimum trimum basunum, sum umsita samrøðurnar, SMS-boðini v.m.

Føroya Tele og Kall hava gjørt eina avtalu um national roaming, t.e. innanlanda reiking. Stutt sagt merkir avtalan, at kundar hjá Kalli kunnu tosa í sínari fartelefon í øllum teimum støðum, har kundar hjá Føroya Tele. Avtalan snýr seg um, at har kervið hjá Kalli ikki røkkur, har kunnu felagarnir knýta seg upp í kervið hjá Føroya.

Royndir uttanlands vísa, at tað kann vera ymiskt, hvussu ein tílík avtala kann ávirka prísirnar. Bjarni Askham Bjarnason hevur onga viðmerking til, hvørjir teirra prísir verða, men hann avvísir heldur ikki, at tað kann hugsast, at kundar hjá teimum uttanfyri fyri Havnina koma at gjalda meira fyri hvønn minutt enn í høvuðsstaðnum og teirra egna kervi.

Ein annar møguleiki er, at prísirnir vera teir somu allastaðni í landinum. Í løtuni kostar ein vanligur GSM-minuttur 1,95 kr. Tað kann hugsast, at hesin prísurin verður minni í eitt nú høvuðsstaðnum og øðrum størri økjum, og prísurin í útjaðaranum verður tann sami sum nú.

Jógvan Thomsen, stjóri fyri Fjarskiftiseftirlitið, sigur, at á GSM-økinum er ongin veitingarskylda sum við fastnetinum. Hóast orðaljóðið í Løgtingslógini um fjarskifti sigur, at útjaðarin skal hava somu rættindi á fjarskiftisøkinum, so er tað einki juridiskt bindandi, sum tvingar veitarar at hava somum prísir í størru økjunum og minnu økjunum.

Kemur hetta upp á tal seinni, so er talan um eina politiska avgerð.

Stjórin á Fjarskiftiseftirlitinum sigur, at teir meta tað vera møguligt at síggja eina lækking í prísum millum 30 og 50%. Tað er sjálvandi altavgerandi, hvussu marknaðurin fer at hátta seg, tá kappingin byrjar.

Høvuðseigarar í Kalli eru: Framtaksgrunnur Føroya 28,40%, NOTIO 18,52%, Íslandssími 17,21%, Tallaton Holding 17,11%, og Teletænastan 12,49%.

# Millum løgtingsmenn og journalistar

**– Í starvsvenjing á Sosialinum**

STARVSVENJING
*Heri á Rógvi*

Seinastu fjúrtan dagarnar hevur Birita Poulsen verið á starvsvenjing á Sosialinum. 15 ára gamla Birita gongur til dagligt í Eysturskúlanum í Havn – í 9.d. Bústað hevur hon í Hoyvík, men í Hoyvíkar skúla er eingin framhaldsdeild, so hon mátti saman við sínum floksfeløgum oman í Eysturskúlan at ganga síðstu árini av fólkaskúlanum.

– Eg havi arbeitt saman við myndamonnunum, tá teir hava tikið myndir og gjørt tær klárar til blaðið. Eisini havi eg roynt at skriva nakrar greinir. Annars havi eg fylgt teimum ymsu blaðfólkunum í teirri arbeiðsdegi, sigur Birita, tá hon greiðir frá sínari starvsvenjing.

– Serliga stuttligt var at sleppa at uppliva tilbúgvingarvenjingina í Kollafjarðatunnilinum. Har slap eg at síggja, hvussu ein tílík venjing og ein møgulig vanlukka verður avgreidd av bjargingarfólkunum. Vit sluppu at ganga heilt tætt við tey »skaddu« og sluppu at flyta okkum runt, sum vit vildu, sigur Birita.

Um orsøkirnar, til at hon valdi Sosialin sum starvsvenjingarstað, sigur Birita, at hon ógvuliga fegin vildi royna, hvussu hetta arbeiði var. Hon vildi fyrst av øllum sleppa á Sosialin.

Birita hevur ætlanir um at fara í tíggjunda flokk komandi skúlaár. Har er møguleiki at velja sær eina sokallaða breyt, og Birita sigur tað vera væl møguligt, at hon fer at velja miðlabreytina, tá hon einaferð skal velja.

– Eg hevði væl kunnað hugsað mær at verið í starvsvenjing eitt sindur longri, tí eg tími ikki so væl í skúla aftur. Men nú er heystfrítíð, so tað er ikki so býtt, tí skúlin má bíða eina viku, sigur Birita.

Hinar genturnar í flokkinum hava verið í starvsvenjing í onkrum barnagarði ella í hárfríðkanarstovum. Hetta var tó ikki nakað fyri Biritu, sum heldur vildi royna seg við penninum á Sosialinum.



*Birita Poulsen hevur seinastu tvær vikurnar verið í starvsvenjing á Sosialinum. Her er hon ein túr í løgtinginum, tá fíggjarlógaruppskotið fyri 2003 varð lagt fram*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



Løgmaður um skrásett parlag og yvirtøku av danskari lóggávu:

# Lóggávan skal hóska til føroysk viðurskifti

**– Tað er sera umráðandi, tá vit fáa egna lóggávu, at hon bæði er gjørd tíðarhóskandi og hóskar til føroysk viðurskifti, ikki minst út frá einum umsitingarligum sjónarmiði sigur løgmaður í viðmerking til kjakið um tey samkyndu og skrásett parlag sigur løgmaður, sum er ímóti skrásettum parlagi fyri samkynd kemur tað hartil, at hetta verður javnsett við hjúnabandið**

LÓGGÁVA
*Jan Müller*



*Anfinn Kallsberg, løgmaður sigur, at málið um skrásett parlag als ikki er viðgjørt í landsstýrinum, og tað fer heldur einki uppskot í tingið, uttan tað er full undirtøka fyri tí í Tinganesi*

– Tað er at yvirreagera, tá Høgni Hoydal, landsstýrismaður nú tosar um at fara í tingið við eini føroyskari familjulóggávu. Tað verður eingin lóggáva á hesum økinum í bræði. Fyri tað fyrsta er málsøkið danskt, og tí skulu samráðingar við donsku stjórnina um at fáa ræðið á økinum. Fyri tað næsta skal føroysk lóggáva smíðast á økinum, sum er velduga stórt. Tað fer at taka sína tíð at fáa ta lóggávuna framda sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður í eini viðmerking til kjakið um yvirtøkur av familjulóggávuni og spurninginum um skrásett parlag.

Løgmaður sigur, at tey í landsstýrinum enn ikki hava sæð ein stav um hetta málið.

Hann viðgongur, at tað í samgonguskjalinum stendur, at henda yvirtøkan skal fremjast í hesum valskeiðnum. – Eg síggi fyri mær, at tað er ein føroysk lóggáva, sum skal setast í gildi í Føroyum. So tað er ikki bara at yvirtaka eitt málsøki og seta ta donsku lóggávuna í gildi í Føroyum. Tann lóggávan skal viðgerast væl og virðiliga. Tað er sera umráðandi at fáa eina lóggávu, sum bæði er gjørd tíðarhóskandi og hóskar til føroysk viðurskifti, ikki minst út frá einum umsitingarligum sjónarmiði.

*– Tekur tú undir við Høgna Hoydal, at eisini tann parturin av lógini, sum snýr seg um skrásett parlag og samkynd kemur við niðan í tingið, tá lóggávan er klár?*

– Tað eri eg als ikki samdur við honum í. Hetta er nakað, sum samgongan skal viðgera áðrenn. So tað er misskilt, tá Høgni Hoydal sigur, at hann skal bera tað niðan, fyri at tingið skal taka støðu til tað, tí tað er ikki ein einstakur landsstýrismaður ella løgmaður, sum leggur nakað mál fram. Tað er eitt landsstýri, sum leggur mál fram. Tvs. at fyrsta fortreyt fyri at kunna leggja eitt mál fyri tingið er tann, at tú hevur undirtøku fyri tí í landsstýrinum. Teir einastu formligu fundirnir vit skulu hava í landsstýrinum yvirhøvur er at samtykkja mál, sum skulu niðan í tingið, og tað hevur als ikki verið roynt at vita, hvørja undirtøku alt hetta málið fær í landsstýrinum. Fær slíkt mál ikki undirtøku í landsstýrinum, so er ein landsstýrismaður heldur ikki førur fyri at fara niðan í tingið við tí.

**Ímóti**

Løgmaður heldur tað tí vera eitt sindur burturvið at tosa um eitt mál, sum man enn einki hevur sæð til. Og løgmaður heldur fram: – Eg haldi ikki, at skrásett parlag skal setast ájavnt við hjúnaband. Tað eri eg ímóti. Eg dugi ikki at síggja, at eitt skrásett parlag skal fáa øll tey rættindi og tær skyldur, sum eitt hjúnalag hevur. Eitt hjúnaband inniber nakrar skyldur eisini fyri tey komandi ættarliðini, og eg dugi illa at fáa inn í mítt høvd, hvussu tað ber til at fáa nakað avkom frá einum skrásettum parlag, kemur tú ikki inn í adoptión og annað. Og har meini eg, at man skal hugsa seg ómetaliga væl um, hvussu langt man fer.

Løgmaður endurtekur, at lóggávan á hesum øki skal fyrireikast væl. Hetta er eitt sera stórt øki, og hann hevur ongan hug til, at vit bara skulu avskriva ella umskriva danskar lógir á tí økinum.

*– Men um hesar lógir líkjast í øllum okkara grannalondum, sum vit vanliga samanbera okkum við, og her í nógvum førum verður víst til grundleggjandi mannarættindi, sum hava altjóða viðurkenning, hví skal slík lóggáva so ikki setast í gildi í Føroyum eisini?*

– Vit í Føroyum skulu gera lógir, sum hóska til okkara samfelag, sjálvt um tey gera nakað heilt annað í øðrum londum. Vit skulu byggja okkara lóggávu á okkara grundarlag og okkara premissur. Eg havi ikki hug at fara í tingið bara tí, at øll hini Norðurlondini gera tað. Vit mugu ikki lóggeva soleiðis, at ein bólkur í samfelagnum gongur omaná øðrum. Tú mást tryggja, at øll hava rætt og møguleika at liva í hesum landinum. Har eri eg ikki ósamdur. Men eg eri ósamdur, har tað verður tosað um, at tú skal gera øll líka, sum ikki eru líka. Tað er ein trupulleiki. Tú mást hava eina lóggávu, sum byggir á nøkur grundvirði. Og so kann man kjakast um, hvat tað er og vera ósamdur um tað. Men hjúnabandið er fyri mær kjarnan í demokratiinum, og tað er eisini tann livihátturin, sum skal vera grundarlagið í tí samfelaginum, sum hyggur frameftir. Men tað skal hinvegin heldur ikki geva nøkrum persóni ella bólki durafjórðingin tvs. ikki geva teimum rættindi í hesum samfelagnum.

*– Tú hevur helst hoyrt tey samkyndu úttala seg um, at tey eru óynskt í Føroyum!*

– Tað skilji eg ikki rættiliga. Tey skulu avgjørt verða vælkomin í okkara samfelag.

*– Men tað eru so tey, sum í kjakinum hava víst á, at tað er ímóti Guds vilja at hava slík fólk í einum samfelag, og at geva teimum eins rættindi sum onnur, og at tey tí eru óynskt!*

– Nú skal eg ikki leggja meg út í tað tjakið. Eg havi nokk við tey politisku tingini í hesum. Tað átrúnaðarliga er sjálvandi sera sterkt í slíkum máli, tí vit byggja jú okkara samfelag á ta kristnu siðalæruna. Hinvegin er tað neyvan nøkur lóg, sum kemur at broyta, um ávísir partar í samfelagnum síggja niður á ella annað, tí hesi hava ein annan livihátt og hava frá skaparans hond fingið nøkur avvik í mun til tey, sum rópa seg at verða tey rættvísu.

Løgmaður sigur, at hann dugir als ikki síggja, at man skal forfylgja hesum fólkum. Man skal tvørturímóti hjálpa teimum og man skal syrgja fyri, at tey kenna seg væl í hesum samfelagnum. Hann er bara ímóti, at tað verða javnsett við hjúnabandið og harvið gevur teimum nøkur rættindi til abdoptión og øll tey tingini, sum hann heldur eru ein partur av hjúnalagnum.

Eg sigi ikki nei til at viðgera eitt uppskot um skrásett parlag kemur tað so langt, men eg vil havda rætt at hava eina meining um hetta. Og samsvarar tað ikki við mína egnu sannføring, so fari eg ikki at mæla til, at tað fer í tingið.

## Kunnar føroyskar politikarar um samkynd og mannarættindi

**– Vónandi taka allir politisku flokkarnir í Føroyum av tilboði mínum at kunna teir um støðuna hjá teimum samkyndu úti sum heima sigur Bogi Davidsen, lækni**

SAMKYND OG MANNARÆTTINDI
*Jan Müller*

Í kjalarvørrinum á kjakinum um støðuna og rættindini hjá teimum samkyndu í Føroyum hevur samkyndi føroyski læknin Bogi Davidsen tikið stig til at kunna føroyskar politikarar um tey samkyndu og teirra støðu úti sum heima. Í gjár skuldi hann hitta umboð fyri fleiri av flokkunum. Allir flokkar høvdu játtað at hitta Boga uttan Miðflokkurin, sum ikki hevði tikið støðu til hesa áheitan, tá blaðið fór til prentingar. Bogi Davidsen sigur við Sosialin, at hann hevur tikið hetta stigið fyri at kunna føroyskar politikarar um eitt mál, sum teir kanska ikki vita so nógv um. Hann viðgongur, at tað er eisini ringt at lóggeva um nakað, sum man ikki veit so nógv um og tí heldur hann tað eisini vera rættiliga umráðandi at geva politikarunum innlit í hvørji rættindi tey samkyndu hava í øðrum londum og í hvønn mun vanlig mannarættindi tryggja hesi fólk. Sjálvur vil Bogi Davidsen fegin vera talsmaður fyri tey samkyndu, sum oftani hava trupult við at orða seg og tala sína egnu søk. – Eg havi lætt við at kunna greiða frá hesum, og tí vóni eg eisini, at politikarar, uttan mun til hvørja áskoðan teir hava, vilja lurta eftir mær. (Sí eisini grein á síðu 11)



*Bogi Davidsen, lækni og samkyndur vónar, at føroyskir politikarar taka av tilboði sínum um at kunna teir um samkynd og teirra støðu*

*Mynd Jan Müller*